
Børnini sungu fyri teimum báðum, meðan Hilmar spældi undir

# Takk – men ikki farvæl

**Seinasta hósdag løgdu hjúnini Gunnvør og Hilmar Joensen frá sær sum ávikavist skúlastjóri og lærari við Nólsoyar skúla**

MÓTTØKA
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Leo Poulsen*

Sum vit nevndu í síðstu viku hevði skúlaráðið við Nólsoyar skúla skipað fyri móttøku í skúlanum í sambandi við, at læraraparið legði frá sær.

Og tey vóru mong, sum nýttu høvið at ganga niðan í skúlan at heilsa upp á og siga takk fyri tað stóra arbeiði, sum tey bæði høvdu lagt í skúlan og mentanarlívið í bygdini sum heild.

Í røðu síni nevndi borgarstjórin, at hóast tey bæði nú takka fyri seg í skúlanum, so siga tey neyvan farvæl. Hvørki um neyðugt skuldi verið at heitt á tey at taka eina hond í í skúlanum av og á, og serliga ikki innan felag- og mentanarlívið í kommununi.

Har vóru øll umboðað, heilt frá borgarstjóranum til minsta næmingin. Og Sosialurin var sjálvandi á staðnum.


*Lærarаparið fekk gávu frá skúlabørnunum, eina ferð við Norrönu. – Hetta kemur væl við, men børnini vita eisini, hvussu væl okkum dáma at ferðast, segði Gunnvør Joensen*


*Tað er ikki ringt at gita, hvat hesir báðir tosa um. Hilmar Joensen, fyrrverandi formaður í Hondbóltssambandi Føroya og Heðin Mortensen, fyrrverandi ÍSF-forseti*


*Jákup Simonsen, deildarleiðari í mentamálum hjá Tórshavnar býráð, og Jógvan Thomsen, stjóri í Fjarskiftiseftirlitinum og seinasti borgarstjóri í Nólsoyar kommunu*


*Ungur nemur, gamal fremur. Abbasonurin, lítli Hilmar, dragsaði stól, nótastativ og gittara fram, fyri síðani at seta seg at »spæla«. Og nei – hann svevur ikki, hann er bara so konsentreraður*


*Væl av fólki var komið niðan í skúlan at heilsa upp á*


*Til eina móttøku hoyrir eisini ábit, og her var talan um pinnamat, ið vildi nakað. Heimabakaðir rugbreyðstríkantar og drýlur, alt við føroyskum viðskera so sum skerpikjøti, rullu- og kjøtpylsu. Tað var Jóhanna Joensen, ið matgjørdi*